# M.J. SALTSØLA BYGGIR Á TOFTUM



**GOYMSLA** Saltsølan, sum Hans Pauli Johannesen, sáli, stovnaði í fimmtiárunum, flytir um stívliga eitt ár inn á Toftir, har J & K Petersen nú fara at byggja eina nýggja saltgoymslu til P/F M.J. Saltsølu. Goymslan fer at taka umleið 5.500 tons av salti og stendur sambært byggisáttmálanum liðug um 14 mánaðir

Vilmund Jacobsen

Í vikuni fara J & K Petersen ætlandi í holt við at byggja nýggja saltgoymslu á nýggja ídnaðarøkinum Inni á Rætt á Toftum.

Tað er P/F M.J. Saltsøla, sum í dag húsast í leigaðum hølum á Vestaru Bryggju í Havn, ið nú skal byggja sína egnu saltgoymslu og fyrisiting á Toftum.

Stjóri í M.J. Saltsølu er Magni Johannesen, sum tók við eftir pápan, Mortan Johannesen, Mortan á Saltsøluni róptur.

Saltsølan hevur annars røtur heilt aftur til abba Magna Johannesen, navnframa Hans Paula Johannesen, sála, sum í 1956 stovnaði Føroysk Saltsøla, ið broytti navn til M.J. Saltsøla miðskeiðis í nítiárunum.

### Trívist í salti

Sjálvur hevur Magni starvast á saltsøluni síðan 1998, tá pápin sat við stýrisvølin, og í 2006 keypti hann felagið, sum hann í dag eigur og rekur.

- Eg trívist í saltinum, tí hetta er tað, eg kenni til, sigur Magni Johannesen brosandi.

Hann heldur ikki, at tað passar so teimum so illa, at goymslan fer at flyta inn á Toftir, tí ein stórur partur av viðskiftafeløgunum hjá M.J. Saltsøluni eru í eysturoyar- og norðoyarøkinum.

- Vit hava eisini viðskiftafeløg í Suðuroy, men hagar verður saltið ført við Smyrli kortini, leggur hann aftrat.

### Byggitiðin 14 mánaðir

Nes kommuna hevur planerað økið til nýggju saltgoymsluna, sum verður bygt beint vestanfyri bygningin, sum felagið Sea Star áður hevur bygt á nýggja ídnaðarøkinum.

- Økið er klárt at fara inn á, og eg vænti, at uppsetingin til fundamentið undir bygninginum byrjar í hesi vikuni.

Magni Johannesen sigur, at byggiharrin í løtuni bíðar eftir fundamenttekningunum, men leggur aftrat, at alt hetta nú eisini er við at koma upp á pláss.

- Bygningurin, sum skal reisast á økinum, verður 70 metrar langur og 20 metrar breiður. Sjálv saltgoymslan fer at rúma umleið 5.500 tonsum av salti. Í einum horni í bygninginum verður gjørt pláss til amboðini, og síðan verður eitt loft lagt í henda partin, har vit fara at hava okkara umsiting.

Magni Johannesen sigur, at byggitíðin sambært sáttmálanum

verður 14 mánaðir, og tað merkir, at M.J.Saltsøla ætlandi húsast egnum og nýggjum hølum á Toftum beint eftir summarfrítíðina næsta ár.

- Sjálv flytingin úr Havn og heim á Toftir krevur ikki tað heilt stóra. Hetta er meiri ein spurningur um planlegging, sigur stjórin.

### Ringvirkningar

Tað eru ikki tey nógv arbeiðs-

> **» sjálvandi hevði tað verið léttari, um skip, sum koma við salti, kundu lagt at, har goymslan er**
>
> MORTAN JOHANNESEN